# Nýtt fiskavirki í Miðvági

**Nýtt fiskavirki er ávegis í Miðvági. Ætlanin er at salta og turka fisk, og farið verður helst í gongd seint í summar ella í heyst**

FISKAVIRKING
*Edvard Joensen*



*Nýtt fiksavirki er reist í Miðvági. Ætlanin er at arbeiða saltfisk og at turka fisk í húsinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Eitt nýtt fiskavirki er ávegis í Miðvági. Bygningurin er reistur og verður innilokaður fyrsta dagin. Ætlandi verður farið undir framleiðslu seint í summar ella í heyst.

Hóast afturgongd nógvastaðni í vinnuni og fráboðanir um vánalig søluútlit og harða kapping við kinesarar, er Jens Eli Ellefsen í Miðvági, sum er maðurin aftan fyri smápartafelagið Pronto, ikki svartskygdur. Hann er farin undir at byggja nýtt fiskavirki, sum skal salta og turka fisk.

– Tað hevur altíð gingið upp og niður við fiskivinnuni, sigur hann, og eg vænti eina uppgongd um ikki so øgiliga langa tíð. So tað er at vera klárur at taka við, tá tað verður. Tað liggur jú í navninum, sum er italienskt og merkir at vera skjótur, vísir hann á.

Talan er um ein gamlan fiskivirkisbygning, sum verður útbygdur, greiðir Jens Eli Ellefsen frá. Langabbin bygdi hesi húsini og bæði abbi og pápi hansara hava turkað fisk her. So tað er í grundini ein familjutraditión, sum verður førd víðari, sigur hann.



*Jens Eli Ellefsen væntar ikki nakran undirgang, hóast fiskaprísirnir í løtuni eru lágir. Tað hevur altíð gingið upp og niður við tí, og hann væntar uppgongd aftur innan alt ov langa tíð, sigur hann*
*Mynd: Edvard Joensen*

Húsini eru í trimum hæddum, og ætlanin er at hava saltfiskavirki í miðhæddini. Har skal vera ein saltfiskalinja við avhøvdara, flekimaskinu og útgerð til at spræna saltlaka í fiskin, greiðir Jens Eli Ellefsen frá.

Á loftinum verður hjallur til at turka fisk í. Tað verður gjørt upp á gamlan føroyskan máta við greipum.

Í niðastu hæddini verður egningarskúrur. Har er longu virksemi. Ein bátur hevur skúr har, eins og agngoymsla og stampagoymsla eisini eru har.

Verkætlanin er ikki av teimum dýrastu, sigur Jens Eli. Arbeiðskraftin er fingin rímiliga bíliga. Hann hevur sjálvur gjørt timburarbeiðið saman við onkrum, hann hevur fingið at hjálpa sær.

– Eg haldi, at tað er nøkunlunda beint eisini, flennir hann. Tó skal tað ikki vera so beint kortini, at vatn ikki setir av.

El- og sanitetsarbeiðið verður hann kortini noyddur at keypa sær, sigur Jens Eli.

Tað virkið fer at standa liðugt, væntar hann, at tað fer at standa í umleið 600.000,- til 700.000,- krónum. Fígging er fingin frá Norðoya Sparikassa.

Jens Eli Ellefsen væntar, at arbeiði fer at verða til eini tíggju fólk ella so, tá farið verður til arbeiðis. Fiskin ætlar hann at keypa á uppboðssølu, sigur hann.

# Vatnið er reint

**Tað verða ongar kloakkir lagdar út í Leitisvatn. Kloakkirnar úr Vatnsoyrum verða leiddar út á sjógv uttarlaga á Sørvágsfirði**

VATNVEITING
*Edvard Joensen*



*Leitisvatn er so reint, sum eitt nátúrligt vatn kann vera. Tað verða ongar kloakkir leiddar í vatnið yvirhøvur, váttar borgarstjórin í Sørvági*
*Mynd. Edvard Joensen*

**Vágar:** Ongar kloakkir verða veittar út í Leitisvatn. Søgur um, at kloakkir úr Vatnsoyrum liggja út Vatnið, eru ikki sannar.

Í samband við grein, sum mikudagin stóð í Sosialinum um, at Miðvágs Kommuna tekur vatn úr Leitisvatni, hevur onkur lesari vent sær til blaðið við fyrispurnigni um, hvussu reint vatnið er, sum miðvingar skulu drekka.

Víst er í fyrispurnginum á, at tað verður sagt, at vatnsoyrarfólk lata sít avlát fara í Leitisvatn, og at tað ikki kann vera serliga hugaligt hjá miðvingum at vita sær, at tey skulu drekka kloakkvatn úr Vatnsoyrum.

Men tað er púra burturvið við slíkum søgum, kunnu bæði miðvingar og onnur ugga seg við.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Miðvágs Kommunu. Men borgarstjórin í Sørvágs Kommunu, Eivin Jacobsen, sigur, at kloakkinar úr Vatnsoyrum verða førdar ut á sjógv uttarlaga á Sørvágsfirði. Og tað hava tær verið í rímiliga nógv ár nú, sigur hann.

Í samband við, at vatnveitingin í Sørvági fyri árum sían varð løgd frá Sørvágsvatni, var samstundis løgd kloakkleiðing úr Vatnsoyrum í somu gravir, sum vatnrørini, og so varð alt pumpað til Sørvágs.

Kloakkirnar úr Vatnsoyrum eru undir eftirliti av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni lagdar út so mikið uttarlaga á firðinum, at eingin ivi er um, at avlopið fer til havs. Útskiftining er stór á Sørvági, so har er alt í lagi.

So miðvingar kunnu vera púra tryggir við tað vatn, teir fáa úr nýggju vatnleiðingini, sigur borgarstjórin í Sørvági.



# Landsverkfrøðingurin sigur fólki upp í Suðuroy

**Maskinur og útgerð batna í hvørjum og tað kostar arbeiðspláss**

SKILABØTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tøknilig framstig kosta fimm fólkum hjá landsverkfrøðinginum í Suðuroy, starvið*

**Suðuroy:** Maskinur og útgerð mennast og batna í hvørjum. Og tað er ikki óvanligt, at tað kostar arbeiðspláss.

Tað ger tað eisini galdandi hjá Landsverkfrøðinginum og eisini hann skilabøtur - rationaliserar.

Seinast hevur hetta kostað fimm monnum hjá landsverkfrøðinginum í Suðuroy starvið.

Ein maður í grótbrotinum í Porkeri varð sagdur upp í heyst. Ein maður á vegadeildini í Øravík fer frá við eftirløn, uttan at nakar annar verður settur ístaðin og beint nú eru tríggir mans í grótbrotinum í Porkeri eisini sagdir upp.

Oyvindur Brimnes sigur, at hesa seinastu tíðina hevur Landsverkfrøðingurin keypt útgerð, sum er meiri framkomin enn tann, sum var, og tað ger, at brúk er ikki fyri so nógvum fólki longur.

Í Porkeri varð ein gravimaskina keypt í heyst, sum tekur væl meiri enn ein gummigeit, sum var frammanundan og tað gjørdi, at tað var brúk fyri einum manni minni at arbeiða í grótbrotinum.

Men tað nýggjasta er, at landsverkfrøðingurin nú hevur keypt ein nýggjan knúsara til grótbrotið í Porkeri.

Hetta er ein knúsari sum kann flyta seg og tí kann hann alla tíðina flyta seg aftaná spreingirnar.

Sostatt verður ikki brúk fyri fólki at koyra grót haðani sprongt verður, yvir til knúsaran.

Knúsarin kostar tríggjar milliónir og hann kemur síðst í mai.

Knúsarin, sum er í Porkeri, er farin og sostatt hevur Landsverkfrøðingurin keypt 20.000 tons av gróti úr Noregi.

– Tað verður annars gjørt við millumbilum og tað er um tað lagi at tað er líka bíligt at keypa grót úr Noregi, sum tað er at bróta tað í Føroyum og føra tað ímillum oyggjarnar, sigur Oyvindur Brimnes.

Tó leggur hann afturat, at tá eru ikki tey samfelagsligu atlitini ikki tikin við, sum tað, at grótbrot í Føroyum skapa arbeiðspláss og skattainntøkur.

### Bjóðast út

Annars hevur Landsverkfrøðingurin bjóðað koyringina av gróti frá havnalagnum á Langasandi, niðan til verkið í Hundsarabotni, út.

Tað var eisini gjørt í fjør, men tað miseydnaðist, tí allir teir, sum koyra, slógu seg saman og bjóðaðu í felag, so tað kom ongin kapping í.

– Men nú royna vit so einaferð afturat, sigur Landsverkfrøðingurin. Hann sigur, at møguliga verður eisini koyringin við asfalti boðin út í ár.

Hinvegin fyriliggur onki um, nær koyringin við gróti úr grótbrotinum í Porkeri oman á havnalagið til grótbátin, verður boðið út.

Landsverkfrøðingurin sigur, at øll arbeiði, sum landsverkfrøðingurin ikki ger sjálvur, skulu bjóðast út fyri at fáa kapping í, so at tað verður so bíligt sum gjørligt.

– So fyrr ella seinni verður koyringin í Porkeri eisini boðin út, sigur Oyvindur Brimnes.

Higartil hevur tað ikki eydnast so væl við tí, sum landsverkfrøðingurin hevur bjóðað út í hesum sambandi, so fyrrenn vit fáa tað at rigga einastaðni, er ongin orsøk til at bjóða koyringina fleiri staðni út.

Í Suðuroynni er tað heldur ongin loyna, at mótstøðan í Porkeri ímóti at bjóða koyringina út, er ógvuliga hørð, tí porkenningar krevja at hava koyringina sjálvir.

# Reingerð er ikki ein grundleggjandi tænasta

**Páll á Reynatúgvu, sum var landsstýrismaður, er ikki samdur í, at reingerð er grundleggjandi tænasta hjá heimarøktini**

ØKISVIÐGERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Vit eiga at umhugsa at broyta heimarøktina so at hon ikki longur skal gera reint heima hjáfólki, sigur Páll á Reynatúgvu*

– Reingerð er ikki ein grundleggjandi tænasta hjá heimarøktini.

Tað heldur Páll á Reynatúgvu, sum til fyri kortum var landsstýrismaður í almannamálum.

Hann er tí ikki heilt samdur við Hans Paula Strøm, sum nú er landsstýrismaður, um, at tað er neyðugt at útseta økisviðgerðina fyri at heimarøktin skal kunna røkja sínar grundleggjandi tænastur.

Hinvegin sigur hann, at tað er neyðugt at rætta eina misskiljing, tí nú eru ymisk sløg av økisviðgerð komin í bland.

Í Sosialinum í gjár helt Soffi Egholm ikki, at tað gjørdi so nógv, at økisviðgerð sálarfrøði varð útsett eitt sindur, tí alt ov lítlar fyrireikingar eru gjørdar fyri at gera kommunurnar førar fyri at bjóða fólki eina økis-sálarfrøði.

Men tað er ikki hetta slagið avøkisviðgerð, sum Hans Pauli Strøm hevur lagt á hyllina fyribils.

– Tann økisviðgerð, sum vit arbeiddu við, og sum er løgd á hyllina, er økisviðgerð innan fysio- og ergoterapi, sigur Páll á Reynatúgvu.

– Tað, sum Soffi Egholm ber fram í Sosialinum í gjár, eru avgjørt viðkomandi spurningar, men hetta var kanska ikki heilt rætta høpið, tí í hesum sambandi snýr tað seg ikki um sálarfrøði, men um fysio- og ergoterapi.

Eftir ætlanini um økisviðgerðina innan fysio- og ergoterapi, er ætlanin, at fysio- og ergoterapeutar skulu geva fólki ymiskar venjingar heima.

Hetta eru ein fyribyrgjandi tænasta, sum skal gera, at fólk verða meiri sjálvhjálpin, Endamálið er, at tey, sum hava mist førleika at klára seg sjálvi, skulu kunnu vinna hann aftur og at tey, sum enn hava førleika, eisini varðveita hann, so at tey klára seg sjálvi sum longst.

Samstundis skuldi hesir økisviðgerðarar kunna lata viðskiftafólkunum ymisk einføld hjálpartól. Hetta skuldi gerast fyri at lætta um hjá Hjálpartólamiðstøðini, sum eisini brúkar nógva tíð uppá at avgreiða umsóknir um tey mest einføldu hjálpitolini.

### Eiga at umhugsa privatiseringar

Páll á Reynatúgvu letur sær annars ikki lynda uttan víðari, at økisviðgerðin innan fysio- og ergoterapi skal leggjast á hyllina og á tingfundi seinnapartin í gjár, ætlaði hann at biðja landsstýrismannin um nærri grundgevingar fyri, hví tað er neyðugt at steðga á við ætlanina at seta økisviðgerðina í verk.

Grundgevingina hjá landsstýrismanninum um at raðfesta reingerð og aðra grundleggjandi tænastu í heimarøktini, góðtekur Páll á Reynatúgvu ikki uttan víðari.

– Eftir mínum tykki er reingerð ikki ein grundleggjandi tænasta hjá heimarøktini.

Uppgávan hjá heimarøktini liggur í orðinum. Tað er røkt og ikki reingerð.

Tí heldur Páll á Reynatúgvu, at vit eiga at umhugsa at loysa tað uppgávuna, sum eitur reingerð, frá heimarøktini.

– Reingerð kundi saktans ligið uttanfyri heimarøktina, sigur hann.

Hann veit eisini, at økisleiðararnir hjá heimarøktini, eru sinnaðir at viðgera spurningin.

Sjálvur umhugaði hann, tá ið hann var landsstýrismaður, at loysa reingerðina frá heimarøktini og at bjóða reingerðina út.Ein annar møguleiki var at gera tað til eina tænastu, sum brúkararnir sjálvir skuldu gjalda fyri.

– Hetta at einskilja reingerðina, hevur verið roynt aðrastaðni, men har hava úrslitini nógva staðni verið vánalig?

– Ja, men tað kann gerast upp á so nógvar mátar og tí er hetta ein spurningur, sum má viðgerðast gjølliga.

– Men eg haldi at tað er rætt at brúka peningin hjá heimarøktini til røkt og ikki til reingerð, sigur Páll á Reynatúgvu.